# Gera nyttu av størri marknaði

**Menningarstovan og Kaupthing hava í felag tikið stig til at skipa fyri eini kunningarferð til Íslands fyri føroyskum fyritøkum. Vit skulu gera nyttu av einum heimamarknaði, sum er blivin sjey ferðir størri, enn hann var, siga stigtakararnir**

VINNUÁTAK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Peter Holm, stjóri í Kaupthing, v.m. og Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni h.m. halda, at tað er ein upplagdur møguleiki hjá føroyskum fyritøkum at gera nyttu av, at heimamarknaðurin er blivin sjey ferðir størri, nú fríhandilssáttmáli er gjørdur við íslendingar. Tí skipa teir fyri kunningarferð til Íslands fyri føroyskum fyritøkum í næsta mánað*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Fyrr í ár skrivaðu Føroyar og Ísland undir fríhandilssáttmála, sum gera hesi bæði lond til ein og sama marknað. Í eini roynd at varpa ljós á teir møguleikar, sum hetta gevur føroyskum fyritøkum, skipa Kaupthing og Menningarstovan fyri ein kunningarferð til Íslands í komandi mánað fyri føroyskum fyritøkum. Endamálið við ferðini er at geva føroyskum fyritøkum betri innlit í íslendska marknaðin, soleiðis at okkurt ítøkiligt kanska kann spyrjast burtur úr nýggja møguleikanum.

### Tómrúm í íslendska marknaðinum

Teir báðir, Peter Holm, stjóri í Kaupthing, og Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni, siga, at tað er pláss fyri føroyskum fyritøkum á íslendska marknaðinum.

- Tað hevur verið fyri tað mesta bert verið tosað um vansar við nýggja fríhandilssáttmálanum millum Føroyar og Ísland, men fakta er tað, at nýggi sáttmálin hevur við sær, at føroyski heimamarknaðurin er sjey ferðir størri, enn hann var frammanundan, sigur Peter Holm.

- Vit hava sæð, hvussu íslendskar fyritøkur seinnu árini í sera stóran mun hava gjørt vart við seg uttan fyri Ísland og lagt seg eftir til dømis danska marknaðinum. Hetta hevur havt við sær, at tað er eitt slag av einum tómrúmi á íslendska marknaðinum, og tað er hetta, ið vit skulu gera nyttu av, sigur Kjartan Kristiansen.

Peter Holm leggur afturat, at íslendingar eru ógvuliga opnir fyri føroyingum, og at av tí at íslendski marknaðurin ikki er serliga stórur lutfalsliga, so er tað ikki so trupult at gerast sjónligur á marknaðinum.

### Stórur áhugi

Tað var Peter Holm sjálvur, ið fekk hugskotið til kunningarferðina, og hann setti seg síðani í samband við Kjartan Kristansen á Menningarstovuni at vita, um teir í felag kundu skipa fyri ferðini.

- Vit fáa mangan fyrispurningar um bæði eitt og annað átak, sum vit kunnu skipa fyri, og sum vit skulu taka støðu til. Tá ið Peter ringdi og greiddi frá sínum hugskoti, var eg beinan vegin í greiður yvir, at hetta var ein upplagdur møguleiki hjá føroyskum fyritøkum at vinna seg fram á einum nýggjum marknaði, sigur Kjartan Kristiansen.

Bæði Kaupthing og Menningarstovan hava ringt runt til ymsar fyritøkur í landinum, og undirtøkan tykist verða stór, siga teir báðir.

- Tað er stórur áhugi fyri ferðini, og enn havi eg so ikki upplivað nakra fyritøku, sum hevur meldað út, at hon ikki kemur við til Íslands, sigur Peter Holm. Hann sigur tó, at um føroysku fyritøkurnar ætla sær inn á føroyska marknaðin, so er alneyðugt, at tær gera tað ordiligt.

At Kaupthing soleiðis tekur stig til eina slíka ferð er ikki av tilvild, og Peter Holm sigur eisini, at teir gera tað ikki bara til stuttleikar.

- Vit síggja stórar møguleikar á íslendska marknaðinum, og tí vilja vit fegin spæla við, um onkur føroysk fyritøka ætlar sær inn á marknaðinum. Men tað krevur, at tað verður gjørt ordiligt, og vit ivast ikki í, at tað ber væl til, um vit hava eitt nóg gott produkt, sigur Peter Holm.

Kunningarferðin til Íslands verður í døgunum 5.-7. desember, og væntandi verða eini 50 fólk umboðandi føroyskar fyritøkur við á ferðini. Á ferðini verður kunnað um einstakar íslendskar fyritøkur, og greitt verður eisini frá, hvussu tú roknskaparliga og løgfrøðisliga fótar tær í Íslandi.

# Nýggjan møblahandil

**Í morgin letur Farodane Casa upp í nýggja bygninginum hjá Thomas Dam á Hálsi. Við hesum verður øll møbladeildin hjá Farodane flutt úr Brekkutúni oman á Háls**

NÝGGJUR HANDIL
**Terji Nielsen**
**terji@sosialurin.fo**



*Heini Weihe rekur nýggja handilin Farodane Casa, sum í morgin letur upp á Smyrilsvegi í Havn í nýggja bygninginum hjá Thomas Dam. Her tekur hann sær av løttum í einum av snotiligu softunum, ið verða at fáa í nýggja handlinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Nýggi møblahandilin er í tveimum hæddum, og tilsamans er talan um góðar 500 fermetrar við øllum møguligum bæði til privat og vinnulív.

### Leingi leitað eftir hølum

Tað er Heini Weihe, ið skal reka Farodane Casa. Hann átti sjálvur fyritøkuna Ergo Design, sum 1. februar í ár legði saman við Farodane. Ergo Design legði dent á at selja úrvalsinnbúgv og sonevndar designaramøblar, og hesir verða nú at fáa í Farodane Casa.

Heini Weihe sigur, at líka síðani samanleggingina fyrr í ár hava teir leitað eftir hóskandi hølum til møbladeildina hjá Farodane, og nú verður so flutt.

- Vit leggja okkum eftir góðskuinnbúgv, og vit hava nakað bæði til privata heimið og til vinnulívsfyritøkuna, sigur hann.

Heini greiðir frá, at í veghæddini verða framsýning av innbúgvi til privat, meðan tað í erva fyrst og fremst er talan um skrivstovuinnbúgv. Farodane Casa umboðar eisini kenda merkið Stokke, ið ger dygdarinnbúgv til smábørn, so sum høgar stólar, pusliborð og barnasengur, ið eru sera vælumtóktar.

Fýra fólk fara at starvast í nýggja handlinum, og harafturat verða fýra montørar knýttir at virkseminum hjá Farodane Casa. Móttøka verður í nýggja handlinum í morgin frá klokkan trý til fimm.